# Viljin Tours setur Kalsoynna á føroyakortið



*Ferðafólkabáturin »M/B Viljin«*



*Skipað verður fyri bæði heildagstúrum, fiskitúrum og leigutúrum*

Við vakrari og óspiltari náttúru og einari sera ríkari søgu er Kalsoyggin eitt upplagt ferðamál, bæði hjá føroyingum og útlendingum. Viljin Tours á Húsum gevur fólki eina góða uppliving á báti, umframt at borðreitt verður við nógvum góðum. Tiltikna matgerðin á Húsum kann nú eisini upplivast um alt landið.

Umframt at vera borgarstjóri á Húsum, er Magni Garðalíð eisini rættiliga virkin innan ferðavinnu, og tá er talan altso fyrst og fremst ferðavinnu á Kalsoynni. Saman við familjuni eigur og rekur hann felagið Viljin Tours, ið ger sítt ítarsta fyri at seta Kalsoynna á føroyakortið í ferðavinnuhøpi.

Felagið hevur síðani í fjørsummar havt ferðafólkabátin »M/B Viljin« í vinnu, og vóru tey ikki so fá, sum í fjør fingu ein góðan túr kring Kalsoynna og í Norðoyggjum annars, sum felagið serliga leggur dent á at vísa ferðafólki, bæði føroyingum og útlendingum.

Vit komu í gongd í fjørsummar, og tað gekk bara heilt væl. Í øllum førum munnu fólk hava hoyrt um okkum, tí longu til komandi summarið hava vit fingið ein hóp av umbidnum túrum við bátinum. Talan er bæði um heildagstúrar, fiskitúrar, leigutúrar og annað. Norðanfyri er sjáldsama vakurt, men er ættin ikki hin besta, kunnu vit eisini fara suðurum og eitt nú fara undir Svínoynna, sigur Magni Garðalíð.

Tað átti heldur ikki at verið so torført at marknaðarført Kalsoynna sum eina perlu í Føroyum, tí her er ótrúliga vøkur og óspilt náttúra, sum bæði føroyingar og útlendingar fáa stóra gleði av at síggja. Men eisini eiga vit eina ríka søgu í oynni, tí vit hava jú bæði Kópakonuna, Páll Fanga og Blankskála, og eisini var fyrsti motorbátur í Føroyum her í oynni.

### Bjóða heildarloysn

Enn er ferðavinnan í Kalsoynni ung, men fyri tað eru bæði ætlanir og dreymar fyri framtíðina, umframt at virksemið hjá Viljin Tours longu nú er víðkað munandi, so gjørligt er at bjóða eina heildarloysn fram, so fólk bæði kunnu síggja og uppliva, men eisini smakka, tí tann so tiltikið góða matgerðin á Húsum stendur frammarlaga í virkseminum.

Longu nú gera vit mat til bæði smærri og størri borðhald kring alt landið, og tann parturin av okkara virksemi er ikki minst eftirspurdur. Vit eru altíð klár, um tað so snýr seg um móttøkur og brúdleyp ella familjuveitslur, so sum føðingardagar, brúdleyp, konfirmatiónir, sigur Magni.

Vit kunnu bæði seta matskránna saman fyri fólk, ella gera tað saman við teimum, alt eftir hvat tey ynskja. So úrvalið fevnir um bæði sjálvtøkuborð, kalt borð, »brunch« ella annað, ið fólk vilja borðreiða við, tá eitt serligt høvi er.

Heildarloysnin hjá Viljin Tours merkir, at tey kunnu taka sær av øllum, sum er rundanum, so sum hølum, borðprýði, bestikki, servitrisum og øðrum. Og sjálvandi ber eisini serstakliga væl fyri at seta saman ein túr við »M/B Viljin«, ið eisini fevnir um ein betri bita.

Magni Garðalíð sigur, at áhugin er so mikið stórur, at ætlanin er at seta ferð á dreymin um eina matstovu á Húsum, sum kann hava eini hálvtannaðhundrað fólk til borðs í senn. Á tekniborðinum verður arbeitt við einari 500 fermetra stórari matstovu, sum óivað kemur at gera Kalsoynna uppaftur meira lokkandi hjá gestum, umframt at fólkið í oynni sjálvandi eisini fer at fáa gleði av henni.

## Dagurin

**1. februar. Brigida**, deyð ár 523. Henda franska halgikvinna stovnaði kleystur í Kildare, og er í Írlandi líka høgt í metum sum sjálvur Pátrikur, sum var ápostul Írlands. Sama navnið sum tey føroysku Birita ogBrita. Upprunaliga keltiskt navn, sum merkir hin høga ella ljómandi.

---

Tíðargreinin

# … Føroyingar á nýggjari kós

eins og stórar almennar íløgur eru gjørdar í samferðslukervið. Í eini roynd at steðga avfólkanini av útoyggjunum, eru íløgur gjørdar í tunlar, havnaløg og ferjur. Samstundis hevur ein nýggj realkreditlóggáva gjørt tað møguligt hjá føroyingum at fíggja hús við rentufríum lánum, og tað hevur av álvara sett ferð á brúksveitsluna. Føroyingar keypa bilar og uttanlandaferðir, sum ongantíð fyrr. Føroyski búskapurin fer buldrandi avstað og hallið á gjaldsjavnvágini er nú 1,2 milliardir.

Sambært fíggjarlógarfrágreiðingini fyri í ár hækkaðu lønarútgjaldingarnar í 2007 við heili 8,2 prosentum. Í november minkaði arbeiðsloysið til tað søguligt lága 1,3 prosent, og nógva staðni er tørvur á arbeiðsmegi.

Hóast bæði danski nationalbankin og føroyska búskaparráðið nú ávara um vandan fyri ovurupphiting, vóru byrjandi krepputekinini ongantíð av álvara eitt kjakevni í valstríðnum. Heldur varð evnið tagt burtur. Nú gongur tað jú akkurát so væl.

Eitt annað álvarsamt evnið er hinvegin komið á dagsskránna, nevniliga gongdin í íbúgvarabýtinum.

Í desember búðu 48.405 fólk í Føroyum. Fólkatalið stendur í stað, og støðugt fleiri tosa um, at meir má gerast fyri at lokka teir 20.000 føroyingarnir, sum búgva í Danmark, heimaftur.

Ikki nokk við at samfelagið hagfrøðiliga er steðgað upp. Eisini kynsbýtið er skeivt. Fyri hvørjar hundrað føroyingar eru 52 menn, og í aldursbólkinum 24-39 ár vanta heili 2.000 kvinnur í mun til menn. Verður gongdin ikki vend, kunnu Føroyar gloyma alt um at gerast eitt sjálvberandi og modernað vælferðarsamfelag, sum kann metast við tey bestu í heiminum.

### Pínligt

Tá stóra formansorðaskiftið í sjónvarpinum setti skjótil á valstríðið gjørdist tað øllum pínliga greitt, at okkurt er rúkandi galið. Fram á skíggjan dagaðu sjey miðaldrandi menn og ein ungur maður við einum nýggjum flokki, hvørs einasta mál var betri miðnámsskúlar. Sjey menn og ikki ein einasta kvinna. Í undanfarna løgtingi sótu kvinnur í bert trimum av teimum 32 tingsessunum. Og sjálvt um fimti hvør tingsessur verður mannaður av eini kvinni nú eftir valið, er langt eftir, til Føroyar kunnu reypa av at vera við í oddinum, tá tað ræður um parlamentariska kvinnuumboðan.

Men onki er so ringt, at tað ikki er gott fyri okkurt. Kanska er júst tað, at kvinnurnar eru so ósjónligar, ein av orsøkunum til, at tey sonevndu bleytu virðini hava fylt so nógv í hesum valstríðnum? Um tað skal verða lokkandi fyri kvinnur at gera seg galdandi í politikki og í heila tikið at geva sítt íkast til samfelagið á jøvnum føti við menn, mugu grundleggjandi vælferðarøkini styrkjast.

Í Føroyum búgva fólk í egnum húsum, og við galdandi húsaprísunum, er tað ógjørligt hjá eini einligari mammu at búgva í Havn, uttan mun til, um hon er flakakvinna ella skúlatannlækni. Íbúðir eksistera stórt sæð ikki, íbúðarstuðul er eitt ókent fyribrigdi og almenna barnasansingin er dýr. Sosialu skipaninar í Føroyum hóska als ikki til nútímans familjumynstur, har støðugt fleiri eru støk ella einligir uppihaldarar.

### Andingarhol

Uttan mun til, hvat landsstýri nú verður skipað, verður ríkiligt at fara í holt við. Vælferðin skal útbyggjast og inntøkumøguleikarnir betrast. Brúk verður fyri nógvum og fjølbroyttum fyritøkum og vinnumøguleikum, og fleiri útlendskir íleggjarar skulu fáast at gera íløgur í kunningartøkni og útbúgving.

Eins og 'innovatión' í Danmark er vorðið nýtt buzzword, tá tað snýr seg um, hvørjum landið skal liva av, er 'nýskapan' vorði gandaorðið í Føroyum. Hóast størsti parturin av inntøkunum framvegis fara at koma frá fiskivinnuni, verður eisini her neyðugt at hugsa nýtt. Bæði við atliti til fiskilóggávu og fígging og til tilfeingi og veiðuhættir, har krøvini til fiskivinnuna um umhvørvisvernd og burðardygd økjast alsamt.

Fyrr ella seinni kemur oljan vónandi eisini at geva eitt íkast til føroyska búskapin og ferðavinnan kann gerast eitt týðandi ískoyti. Viðurkenningin frá amerikanska ferðatíðarritinum fyri stuttum er ikki eitt einstakt dømi. Alsamt fleiri fáa eyguni upp fyri føroysku náttúruni sum eitt andingarhol í einum heimi av larmi og strongd. Eisini í Føroyum verður varpað ljós á ferðavinnu. Íløgur verða gjørdar í gistingarhús, matstovur og caféir, og satsað verður meir á mentan, so sum festivalar við altjóða viðurkendum tónleikararum sum Eivør, Teitur og Brandur Enni.

### 266b oyðilegði myndina

Skulu Føroyar 'brandast' framyvir, er tað hinvegin sera týdningarmikið, at komandi løgting heldur seg burtur frá málum, sum oyðileggja myndina úteftir, eins og fyri einum ári síðani, tá ógvusliga kjakið í Føroyum um 266 b vakti ans kring allan heimin. Og tá tað bara við neyð og deyð eydnaðist fólkaræðinum at vinna á kristnu fundamentalismuni.

Gamla máliskan 'alt kann henda í politikki' er eisini galdandi í Føroyum. Men uttan mun til, hvørjir politiskir flokkar nú finna saman, verður tað spennandi – eisini fyri danir – at fylgja stríðnum hjá føroyingum at gerast eitt ev heimsins bestu londum. Og ikki minst teirra nýggju kós fram móti politiskari og búskaparligari burðardygd.

*Umsett: Anna V. Ellingsgaard*